# Samanumtøka fyri málini í 2024

IRF setti 8 mál fyri 2024:

## Mál 1

**IRF skal kanna útlátið av ymisku burturkastsbólkunum.**

Við støði í 2023 tølum skal IRF kanna útlátið av øllum burturkastsbólkum frá innsavnan, handfaring, viðgerð og til møguligan flutning. Hetta fyri frameftir at kunna tilrættisleggja og hagreiða alt burturkast so umhvørvistvinarligt sum tilber. Rambøll hevur skipað arbeiðið við $CO_2$-hagtølunum. Við hagtølunum fer IRF at veita føroyskum vinnulívi nágreinilig tøl fyri, hvussu stórt $CO_2$-útlát stendst av tí burturkasti, sum vinnan letur IRF. Hetta eru tøl, sum hava alsamt vaksandi týdning á altjóða marknaðinum og sum gerast partur av ESG-frágreiðingum.

Málið er sett við støði í umhvørvispolitikkinum hjá IRF og byggir á heimsmál 12.




**Støða:** 100% avgreitt.

## Mál 2

**Øll seks økini hjá IRF skulu vitja ella fáa vitjan av IRF í 2024.**

Sum orðað í umhvørvispolitikkinum hjá IRF, er tað ein av fremstu uppgávum felagsins at upplýsa um og eggja til fyribyrging, endurnýtslu og endurvinning av burturkasti í Føroyum. Hetta verður m.a. gjørt, tá ið vitjandi eru á Hagaleiti, og tá IRF vitjar úti í samfelagnum. Tey seks økini hjá IRF eru Norðoyggjar, Eysturoy, Norðurstreymoy, íroknað Sunda kommunu, Vágar, Sandoy og Suðuroy.

Málið er sett við støði í umhvørvispolitikkinum hjá IRF og byggir á heimsmál nr. 12 og 17.







**Støða:** 100% avgreitt. Í 2024 vóru 42 arbeiðspláss á vitjan hjá IRF við tilsamans 279 starvsfólkum. Harumframt vóru 749 børn og ung og vitjaðu IRF. Eisini vitjaði IRF skúlar, kommunur og vinnuna. Vitjanirnar umboðaðu øll seks økini hjá IRF.

# Mál 3

**IRF skal í 2024 menna lærandi tilfar til aldursbólkin, ið svarar til 4.-7. flokk í fólkaskúlanum.**

Við at menna tilfar, sum økir vitanina hjá næmingum um umhvørvis- og burturkastsøkið, økja vit um umhvørvistilvitið hjá børnum og ungum. Við at menna føroyskt tilfar sum ískoytis tilfar til undirvísingina í skúlum, kunnu vit í størri mun vera við til at skapa hugburðsbroytingina, at burturkast er tilfeingi, sum vit eiga at fáa sum best burturúr og halda í ringrás sum longst.

Málið er sett við støði í umhvørvispolitikkinum hjá IRF og byggir á heimsmál nr. 12 og 13.






**Støða:** 100% avgreitt. Allir fólkaskúlar í økinum hjá IRF hava fingið bjóðað blaðið sum ískoytistilfar til undivísingina. Allir næmingar, sum koma á vitjan hjá IRF á Hagaleiti, fáa blaðið. Harumframt kann blaðið takast niður av heimasíðuni hjá IRF.

# Mál 4

**Nýggj framsýningarrør í móttøkuni**

Í 2024 komu trý nýggj framsýningarrør at standa í forhøllini hjá IRF á Hagaleiti. Hesi rør verða nógv brúkt, tá barnagarðar og skúlar vitja IRF.

Rørini vísa, hvussu vit skulu skilja burturkast í gráa, hvíta og reyða posa. Tað er sera gevandi fyri børnini at síggja hesa ítøkiligu skiljingina av vanliga húsarhaldsruskinum, og tað kemur meira enn so fyri, at fleiri av teimum vaksnu, sum ganga fram við rørunum, eisini læra okkurt.

Mál: IRF arbeiðir støðugt við at menna vitjanarkonseptið og at gera tað læruríkari, og á hvørjum ári legst okkurt nýtt afturat. Hetta er partur av heimsmálinum nr. 12, Ábyrgdarfull nýtsla og framleiðsla.




**Støða:** Hetta er komið á mál.

# Mál 5

**Granska gráa burturkastsposan**

Gransking av burturkastinum í húsarhaldsposunum gevur innlit í og hagtøl fyri innihaldinum í gráa posanum. Henda kanningin varð gjørd á fyrsta sinni í 2023. Endamálið er at kanna, hvat verður latið í gráa posa, um okkurt av hesum kundi verið farið til endurvinningar í staðin, um vit betra okkum á økinum, og um ymisku kunningarátøkini og tiltøkini vísa seg at gera mun.

Málið er sett við støði í umhvørvispolitikkinum hjá IRF og byggir á heimsmál nr. 12.

**Støða:** Arbeiðið er í gongd. Tilboð er móttikið frá ráðgeva og verður eftir ætlan gjørt í heyst 2025 og hereftir annað til triðja hvørt ár.

# Mál 6

**Betri skiljing av metallum á Gjánoyri**

Magnet er komið á Gjánoyri, sum gevur betri møguleikar fyri skiljing av metallum. Gongd er komin á at skráseta nøgdir av kopar og aluminium í 2024. Málið er at økja nøgdirnar við 10% í 2025.

Hetta er partur av heimsmálinum nr. 12, Ábyrgdarfull nýtsla og framleiðsla.

**Støða:** 100 avgreitt.

## Mál 7

**Málingablikk (jarn/metal) frá ”Serburturkast” skal skiljast sum jarn.**

Arbeitt verður við at broyta mannagongd, tá máling kemur inn í jarnblikkum. Málið er, at framyvir skulu øll málingablikk tømast og beinast í jarn til Gjánoyrar og endurnýtast.

Málið er partur av umhvørvismáli nr. 12, Ábyrgdarfull nýtsla og framleiðsla.




**Støða:** Enn verða nógv málingablikk brend. Tørvur er á skipaðum mannagongdum soleiðis hesi blikk verða endurnýtt.

## Mál 8

**Kunningartiltøk um burturkast, nýtsluvanar og umhvørvi.**

IRF miðjar ímóti at taka lut í tiltøkum kring landið. Í 2024 hevur IRF m.a. luttikið á:

- Tiltaki um burturkast og vanar, sum Rudda Føroyar skipaði fyri
- Tiltaki hjá Vinnuhúsinum um burturkast, ringbúskap og burturkastshagtøl
- Tiltaki um burturkast og skiljing í Vága kommunu í sambandi við “Undirfagra mai”
- Kunningartiltaki á Miðnámi á Kambsdali

Hetta er nakað, sum IRF framhaldandi arbeiðir við og vil menna. Eitt av málunum hjá IRF er deila av okkara vitan um burturkast, endurnýtslu og umhvørvisøki.




**Støða:** Málið hjá IRF er at luttaka á minst fimm líknandi tiltøkum í 2025.